Jógvan Mørkøre:

# Góðtekur ikki ávaringina

**Jógvan Mørkøre ætlar ikki at góðtaka ávaringina, ið hann fekk frá rektaranun á Fróðskaparsetrinum fyri útalilsir í sambandi við nógv umrøddu Menas-frágreiðingina. Hann ætlar víðari við málinum, og hevur sett fram krav til leiðsluna um at taka aftur ávaringina**

FRÓÐSKAPARSETRIÐ
*Heri á Rógvi*

Tað er líkt til, at tann nógv umrødda Menas-frágreiðingin enn eigur fleiri orð at tala. Tann oftani umstrídda frágreiðingin spreiddi sum ringar í vatninum søgur frá sær frá fyrstu løtu, frágreiðingin alment kom fram.

Jógvan Mørkøre kom í februar mánað við nøkrum úttalilsnum í sambandi við hina so nógv umrøddu Menas-frágreiðingina. Hetta endaði alt við, at Jógvan Mørkøre fekk ein ávaring frá leiðsluni á setrinum, og hann fór eisini í farloyvi, men er síðani komin aftur til arbeiðis á Fróðskaparsetrinum.

Jógvan Mørkøre er limur í Magistarafelagi Føroya, og hann boðaði í februar mánað frá, at hann fór at lata felagnum málið. Magistarafelagið hevur síðani latið málið farið víðari til ein advokat, sum hevur sent leiðsluni á Fróðskaparsetrinum eitt skriv.

Kate Sanderson er forkvinna fyri Magistarafelagið, men hon vil ikki gera viðmerkingar til málið, so leingi málið enn verður viðgjørt av Fróðskaparsetrinum. Hon váttar tó, at eitt skriv er sent til setrið vegna Jógvan Mørkøre.

Hans Pauli Joensen, vararektari á Fróðskaparsetrinum, vil ikki gera nakra viðmerking til málið. Hann vísir til Maluna Marnersdóttir, rektara, men hon var stadd uttanlands, tá vit royndu at fáa hendur á henni hósmorgunin.

Eftir hvat Sosialurin skilir er kravið frá Jógvan Mørkøre, at ávaringin verður tikin aftur – annulerað.

Sett er eisini fram eitt evstamark fyri, nær Fróðskaparsetrið skal hava gjørt hetta. Eftir hvat Sosialurin skilir, so hevur fundur verið, har málið hevur verið fyri, men orsakað av fráveruni hjá bæði rektaranum og Jóan Paula Joensen, umboð fyri Søgu- og Samfelagsdeildina, so má ein avgerð bíða.

Tað verður – eftir hvat skilst – gjørt greitt, at fleiri stig verða tikin, um leiðslan á setrinum ikki tekur aftur ávaringina.



*Jógvan Mørkøre ætlar ikki at gevast á hondum við málinum um hansara úttalilsir í sambandi við Menas-frágreiðingina*

## Gongdin í málinum

**Søgugondin í málinum um Menas-frágreiðingina**

*Heri á Rógvi*

Tað var oljufelagið BP, sum gjørdi av at gera eina kanning um árinini av einari møguligari oljuvinnu í Føroyum. Hetta vakti ans, tí nógv mettu stóran tørv var á einari tílíkari kanning. Arbeiðið var sett í gongd, og tað var bretska ráðgevingarfyritøkan Menas, sum fekk til uppgávu at greiða frágreiðingina úr hondum.
Í fororðunum í sjálvari frágreiðingini stendur at lesa, at tað var í september 2000, BP heitt á Menas í samstarvi við Fróðskaparsetur Føroya um at gera eina tílíka frágreiðing. Í somu fororðum stendur eisini at lesa:

Endamálið við hesi kanning er at kanna tað búskaparliga, politiska, sosiala og umhvørvisliga samanhangið, sum ein framtíðar oljuvinna møguliga fer at virka í. Harumframt skal kanningin meta um møgulig høvuðsárin á tað føroyska samfelagið, meðan leitað verður eftir olju, meðan olja verður framleidd, og frameftir. Tørvurin á einum tílíkum arbeiði varð staðfestur í frágreiðingini frá Oljuráðleggingarnevnd Landsstýrissins: Fyrireikingar til oljuleiting, ið kom út í 1997.

Menas savnaði saman ein røð av serfrøðingum innan nógv øki, sum allir skuldu virkað innanfyri sítt økið, tí frágreiðingini í evnum var rættiliga umfatandi.

Millum serfrøðingarnar vóru eisini føroyskir serfrøðingar, sum vórðu knýttir at verkætlanini gjøgnum Fróðskaparsetur Føroya. Tað var tó skjótt, at tað kom vátt í reiðrið millum partar av føroysku manningini og leiðaran fyri verkætlanini, John Christensen frá Menas.

Á stórari oljuráðstevnu í Norðurlandahúsinum í november mánað 2001 kom ein samandráttur av sjálvari frágreiðingina fyri dagin fyri fyrstu ferð. Tá løgdu eisini nakrir av rithøvundum fram um partar av kanningini.

Síðani tá hevur nógv rok verið um sjálva frágreiðingina, sum bæði gjørdar nakrar niðurstøður, ið ikki fullu í góða jørð. Men tað vóru serliga atfinningarnar hjá Suni á Dalbø, sum vaktu stóran ans í fjølmiðlunum. Hann hevði ógvuliga lítið gott at bera arbeiðinum í sambandi við verkætlanina, sum hann helt vera óvísindaliga.

Vit máttu tó bíða heilt til 22. februar 2002 til verkætlanin loksins varð latin almenninginum. Undan hesum hevur Jógvan Mørkøre, adjunktur á Søgu- og samfelagsdeildini á Fróðskaparsetri Føroya úttala seg um, at Fróðskaparsetrið ikki eigur at leggja navn til frágreiðingina. Hann sigur m.a., Fróðskaparsetrið meira er at meta sum ein undirveitari enn nakað annað.

Um mánaðarskiftið gerst so greitt, at leiðslan á Fróðskaparsetrið Føroya, Setursráðið, ætlar, at úttalilsini hjá Jógvani Mørkøre skulu fáa avleiðingar fyri Jógvan. Jógvan Mørkøre fær eina ávaring frá leiðsluni, og hann fer eisini í farloyvi, men kemur síðani aftur í starvið hjá sær.
Hann letur málið í hendurnar á Magistarafelag Føroya, sum seinni tekur stig í málinum við at biðja advokat senda Fróðskaparsetrinum skriv, har kravt verður, at áheitanin verður tikin aftur.

Málið hevur eisini verið fyri við fyrispurningi í Løgtinginum.

# 13 tikið dugnaskapsroynd



*Mynd: Teir trettan saman við lærarum teirra*

*Mynd: Finnur Justinussen*

Mikudagin 5. juni vóru trettan menn til dugnaskapsroynd í motorlæru. Teir trettan hava gingið á Tórshavnar Kvøld- og Ungdómsskúlai vetur. Á skeiðinum hava teir lært um maskinlæru, ravmagnslæru, kølitøkni, eldsløkking og tænastukunnleika. Dugnaskaparprógvið veitir rættindi at passa motorar við framtøkumegi upp til 611 HK í heimasigling, t.e. innanfyri 200 fjórðingar.

Lærarar í vetur hava verið Alfred Hummeland og Gordon Højgaard.

Dugnaskapsroynd í motorlæru tóku hesir:

Steingrím Abrahamsen, Eyðun Bech, Pauli Heygsá, Trygvi Jacobsen, Johannes Johannesen, Sonne Mikkelsen, Heðin Ólavsson, Palli Petersen, Finn Rubeksen, Einar Thomassen, Danial P. Thomasen, Einar Vennet og Karlon Winther.

-hr



# Fast samband loysir seg

*Bjarni Djurholm, landsstýrismaður við samferðslumálum, heldur, at fast samband loysir seg betri enn at útbyggja ferjunetið, tá hann helt røðu á ráðstevnu um samferðslu í Útnorði*

*Mynd: Jens Kr. Vang*



**– Cost-benefit kanningar vísa, at tað er bíligari at gera íløgur í fast samband heldur enn at úbyggja ferjusambandið millum oyggjarnar, segði Bjarni Djurholm, landsstýrismaður við samferðslumálum, tá ráðstevnan um ferðslu og flutning í Útnorði lat upp hósdagin**

SAMFERÐSLA
*Stefan í Skorini*

Hósmorgunin fór ráðstevnan um sumferðslu í Útnorði av bakkastokki. Tveir dagar eru settir av til hesa ráðstevnu, sum Útnorðurráðið skipar fyri.

Ásannandi at Ísland, Føroyar og Grønland hava stórar trupulleikar við ferðslu og flutningi, sum standast av teimum landafrøðiligu viðurskiftunum, hevur ráðið tikið stig til eina ráðstevnu, sum umrøður hesar trupulleikar.

Hjálmar Árnason, formaður í Útnorðurráðnum, hevði fyrsta orðið, og hann vísti á, at bara 400.000 fólk búleikast í Útnorði, og tað er sama fólkatal sum í Fredriksberg kommune í Danmark. Munurin er, at Útnorður er sum Evropa til støddar.

Hetta ger tað torførari at sleppa aftur og fram bæði innanlands og millum londini. Fyri at varpa ljós á og at loysa nakrar av hesum trupulleikum hevur Útnorðurráðið tikið stig til eina ráðstevnu, ið skal umrøða støðuna í teimum ymsu londunum.

Tinglimir úr teimum ymsu londunum hava sett hvørjum øðrum stevnu í Norðurlandahúsinum, har teir fáa upplýsingar úr teimum trimum londunum.

**Fast samband**

Bjarni Djurholm umrøddi støðuna á samferðsluøkinum í Føroyum, og hann legði dent á, at tað er bíligari hjá tí almenna at gera fast samband millum oyggjarnar heldur enn at útbyggja ferjusambandið.

Ferjusambandið krevur nógv meira viðlíkahald, tí ferjulegurnar eru kostnaðarmiklar at gera. Skipini fara eisini við árunum og skulu skiftast út við jøvnum millumbili.

Bjarni Djurholm umrøddi eisini ferðsluna um fløgvøllin í Vágunum, sum er økt munandi seinastu árini. Hann heldur, at hetta m.a. stendst av kappingini millum Maersk og Atlantic Airways. Prísirnir lækka, og fólk ferðast tí meira.

Ráðstevnan var allan hósdagin og til middag fríggjadagin. Fleiri áhugaverd innlegg eru á skránni, sum viðgera samferðsluna í Útnorði.

# Íslendingur fekk fýra mánaðar




*Fyri tveimum vikum síðani fangaði ferðsluløgreglan ein íslendskan mann, sum hevði næstan 1,3 kilo av hassji í bilinum. Hann fekk fýra mánaða fongsulsrevsing*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

Ein 41 ára gamal íslendingur fekk mikudagin fongsulsrevsing í fýra mánaðir fyri at hava 1,29 gramm av hassji við sær til landið. Hann verður harumframt burturvístur úr Føroyum í fimm ár.

Maðurin varð tikin 28. mai í eini tilvildarligari ferðslukanning. Løgreglumenninir fingu illgruna til mannin, tí teir luktaðu hassj í bilinum. Tá narko-hundurin fór at leita í bilinum funnu teir meira enn eitt kilo av hassji.

Maðurin er dømdur fyri at smugla hassj við tí endamáli at selja tað víðari í Føroyum. Hetta noktaði maðurin og segði, at alt hassjið var til egið brúk, men hesum trúði dómarin ikki. Maðurin tók við dóminum.

Við í bilinum hjá manninum var eisini sonur hansara og ein føroyingur. Hesir eru ikki ákærdir í málinum, tí ikki ber til at prógva, at teir hava nakað samband við hassjið.

# Sofus í Smiðjuni

*Framsýningin hjá Sofusi Poulsen lat upp hósdagin, og hann hevur tjúgu vatnlitamálningar við á framsýningini*

*Savnsmynd*



**Listaframsýning við havnarmanninum Sofusi Poulsen lat upp í gjár, og hann hevur málað teir flestu málningarnar í einum bili, ið verður nýttur sum rullandi atelier**

FRAMSÝNING
*Stefan í Skorini*

Seinastu sjey árini hevur 48 ára gamli Sofus Poulsen úr Havn havt listaframsýning í Smiðjuni í Lítluvík. Framsýningin í ár lat upp hósdagin, og hon verður opin í eina viku.

Umleið tjúgu málningar verða sýndir fram, og teir eru allir vatnlitamálningar av landsløgum, býarløgum, bátum og øðrum.

Sofus sigur, at hann hevur atelier í einum bili, sum hann hevur gjørt út, so at hann kann mála í bilinum. Soleiðis hevur borið til hjá Sofusi at mála sínar málningar, meðan hann hevur sitið frammanfyri motivinum, sum hann málar.

Listamálarin sigur, at hann hevur fingið stóran íblástur av sumrinum, sum vit veruliga hava merkt seinastu vikurnar. Tí eru nógvir tímar brúktir í hesum bilinum hjá Sofusi.

Málningarnir eru allir frá støðum í Suðurstreymi, har Sofus hevur koyrt runt í bili sínum og málað. Sjálvur sigur hann, at málningarnir eru impressionistiskar summarmyndir.

Sofus Poulsen hevur málað og teknað alt sítt lív, og seinastu tíggju árini hevur hann gjørt nógv við hetta ítrivi. Hann hevur tó familju og arbeiði, so tíðin er tó eitt sindur avmarkað.